

Eldar Sætre, fyribilsstjóri í Statoil. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Statoil vil gerast óheft av politisku eigarunum

**Jógvan Hugo Gardar**

24.11.2014 - 16:27

Oljan.fo

Í einum innanhýsis skjali hjá Statoil kemur fram at fyritøkan arbeiðir við at gerast meir óheft av politisku skipanini í Noregi. Norski landskassin er stóreigari í Statoil, men nú ynskir fyritøkan at hetta bandið skal gerast leysari komandi fimm-seks árini.

Tað er Dagens Næringsliv sum skrivar um hetta innanhýsis skjalið. Talan er um kunningarætlanina fyri komandi árini, ið Dagens Næringsliv hevur fingið hendur á. Har stendur millum annað at fyritøkan skal gerast minni heft av politisku skipanini.

Kunningarætlanin hevur fýra mál. Meir óheftni er eitt av málunum, meðan hini trý málini eru at tryggja eitt betri samskifti við fólkið og norsk áhugamál.

Kunningarstjórin í Statoil, Jannik Linbæk jr., avvísir at talan er um eina nýggja ætlanan, men eina menning av tí ætlanini sum bleiv løgd tá Statoil fór á keypsskálan og pribvatir eigarar kundu keypa seg inn í felagið.

Orkupolitiski talsmaðurin í Arbeiðaraflokkinum, Terje Lien Aasland, heldur ikki at tað ljóðar sum eitt gott hugskot at Statoil skal gerast meir óheft av sínum størsta eigara.

Leif Sande, ið er leiðari fyri fakfelagnum Industri Energi, meinar at Statoil longu hevur umfatandi frælsi, og tí heldur ikki hevur nakað at gremja seg um